# nalpolitikki



*Skuldin hjá Vestmanna kommunu er nú komin væl niður um eina álíkning. Kommunan hevur verið skuldarbundin, men við árunum hevur eydnast at rinda niður á hesa skuld*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

kann tað gerast neyðugt at útseta verkætlanina, sigur borgarstjórin.

Vestmanna kommuna var annars ein av teimum fyrstu kommununum í landinum sum fekk eldrasambýli.

– Hetta eru tó bara eini sethús, sum eru sett í standa til endamálið. Pláss er fyri umleið 6-7 búfólkum og kanska nøkrum aftrat, tá talan er um hjúnarfelagar, sum eru á sambýlinum samstundis.

Á hinari síðuni, sigur borgarstjórin, at kommunan í løtuni megnar at nøkta tørvin á dagrøkt.

– Vit hava dagstovn og frítíðaransing av børnum, sum eru undir skúlaaldur og børnum, sum ganga í 1. og 2. flokki.

**Ovasta rók**

Karl A. Olsen bleiv fyrstu ferð valdur í Vestmanna bygdarráð á kommunuvalinum seinast, og sum nýggjur í kommunalpolitikki gjørdist hann eisini borgarstjóri í Vestmanna. Hann kom soleiðis upp á ovastu rók í kommunalpolitikki í einum.

– Eg havi nú sitið í hesum starvi í hálvt fjórða ár, og mær hevur dámt hetta væl. Hetta hevur verið ein spennandi og gevandi tíð.

Umframt at vera borgarstjóri, umboðar Karl eisini kommununa í Føroya Kommunufelag og er eisini í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Hesi álitisstørv merkja nógva fundarluttøku, og tí gjørdi borgarstjórin av at fara í farloyvi frá sínum lærarastarvi á sumri fyri tveimum árum síðan.

– At arbeiða sum lærari á Kambsdali í hálva tíð umframt at røkja nevndu álitisstørv gjørdist mær ov nógv, og tí kann eg nú brúka alla mína tíð upp á Vestmanna kommunu og tey álitisstørv, sum eru knýtt at hesum, sigur Karl A. Olsen.



*Borgarstjórin í Vestmanna, Karl A. Olsen, er bjartskygdur og heldur, at útlitini hjá Vestmanna kommunu sum heild eru rættiliga góð. - Jú, eg haldi, at hetta sær bara heilt gott út, sigur hann*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Nógv virksemi er á havnalagnum í Vestmanna, og á myndini síggja vit eisini nýggja Fiskivinnuskúlan, sum nú verður bygdur í Vestmanna*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

# Ein kommuna við nógvum vinnulívi

**Í Vestmanna býr gott fólk, og tá allar góðar kreftir í kommununi viðvirka til, at bygdini skal gangast væl, skal meira enn eitt lítið nos til, at bygdasamfelagið fellir í fátt**

VESTMANNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Vestmanna kommunu er nógv vinnulív, bæði á sjógvi og landi.

Bygdin hevur upp ígjøgnum árini átt fleiri reiðarar, og tá ið teir gomlu løgdu frá sær, tóku teir yngru yvir.

Hetta eru dugnaligir menn, sum hava nógvar fiskimenn siglandi við sínum skipum.

Meðan onkur bygd kann sigast at vera línubygd burtur av, er Vestmanna bygdin, sum hevur traditión fyri trolvinnu.

Vit plagdu at siga, at Klaksvíkin, Toftir og Eiði vóru línubygdir, men tíðin stendur ikki í stað, og í dag eru fleiri trolarar heimahoyrandi í Klaksvík.

Í Vestmanna hevur verið hildið fast um trolvinnuna, og tí eru nógvir vestmenningar og menn í grannabygdum dugnaligir í trolvinnuni.

Tað var tí kanska ikki so undarligt, at eitt nýtt trolvirki í Føroyum – Føroya Trol – sá dagsins ljós í Vestmanna fyri fáum árum síðan.

Í Vestmanna er eisini stór framleiðsluvinna innan fiskiídnaðin – við virkinum hjá Faroe Seafood og nýggja gulllaksavirkinum Atlantis, sum reiðararnir í bygdini saman við øðrum hava lagt lunnar undir.

Tey, sum starvast her, eru dugnalig fólk, sum fleiri hava arbeitt í fiskavirkisvinnuni í mong ár.

Fiskur verður aldur á Vestmanna, eins og smolt eisini hevur verið framleitt á vøtnunum.

Stóru vinnulívsmenninir og reiðararnir í Vestmanna, Tummas Christophersen og Dánjal Jacobsen, eru saman við øðrum ófrír at skapa virksemi í bygdini og í nærumhvørvinum.

Tummas eigur meginpartin av Vestmenningi og Fram (JFK eigur 10%), og Dánjal Jacobsen eigur Vesturbúgvan. Saman eiga teir so eisini Nornagest og Kolumbus. Trolbáturin Skálafossur er eisini ein partur av skapandi virkseminum hjá vinnulívsmonnunum.

Tá Faroe Seafood gavst við gulllaksavirkseminum í Vestmanna, tóku Tummas Christophersen, Dánjal Jacobsen og Dánjal J. Andreasen yvir.

P/F Vestmanna Fiskavirki, sum er eitt gamalt felag, eigur Atlantis, har tey áður arbeiddu laks.

Teir, sum í dag eiga ein stóran part av gamla felagnum, eru aftur Tummas Christophersen og Dánjal Jacobsen, sum er stjóri í P/F Vestmanna Fiskavirki.

Fleiri smærri eigarar eru eisini.

Vinnulívið í Vestmanna hevur lagt lunnar undir eina 1800 tons stóra frystigoymslu, sum saman við nýggja gulllaksavirkseminum er ein íløga upp á einar 30 miljónir krónur tilsamans.

Seks skip plaga at fáa loyvi at veiða gulllaks í vertíðini, sum er summarhálvan. Tey eru Vestmenningur, Fram, Eysturbúgvin, Vesturbúgvin og Stjørnan og Polarhav.

Vestmenningar eiga trý av hesum skipum, Vestmenning, Fram og Vesturbúgvan, sandoyingar eiga Eysturbúgvan, og leirvíkingar eiga Polarhav og Stjørnuna.

Men tað eru ikki bara vestmenningar, ið sigla við skipunum, sum eru heimahoyrandi í bygdini og arbeiða á teimum virkjum, sum vinnulívið hevur skapt. Tað eru eisini onnur, ið njóta gott av hesum virksemi.

Við so dugnaligum vinnulívsfólki, arbeiðsfólki og fiskimonnum er ikki løgið, at borgarstjórin, Karl A. Olsen, er bjartskygdur um framtíðina hjá Vestmanna kommunu.